# Lindin víðkar um sendiøkið

*Seinni í ár fer útvarpsrásin Lindin eisini at senda umvegis Brúnaskarð í Klaksvík*

Kristiliga útvarpsrásin, Lindin, hevur søkt Radioeftirlitið um at fáa ein frekvens afturat at senda á. Hetta hevur útvarpsrásin gjørt, tí hon ætlar at seta ein sendara upp á Brúnaskarði oman fyri Klaksvík seinni í ár.

– Vit hava spart pengar upp til keyp av einum nýggjum sendara, og so skjótt sum vit hava fingið ein frekvens frá Radioeftirlitinum verður sendarin bílagdur, sigur Preben Hansen, ein av høvuðsmonnunum aftanfyri Lindina.

Neyðugt er at hava ein frekvens at senda á, tá sendarin verður bílagdur, tí hesin frekvensurin skal leggjast í sendaran, áðrenn hann kann latast. Lindin roknar við, at hon kann fáa svar frá Radioeftirlitinum eina ferð í næstu viku.

– Vit koma at bíða í umleið ein mánað eftir sendaranum, men vit ætla okkum at seta hann upp beinanvegin, tá vit hava fingið hann, sigur Preben Hansen.

### Lagt pengar til síðis

Í løtuni sendir Lindin á 101 MHz, og rásin hoyrist í høvuðsstaðarøkinum og á Skálafjørðinum. Við nýggja sendaranum fer rásin at røkka enn fleiri fólkum, tí tá fáa millum annað klaksvíkinginar, fuglfirðingar, lorvíkingar og gøtufólk møguleikan at seta útvarpstólið á Lindina.

– Ætlanin hevur alla tíðina verið at røkka fleiri fólkum, og hóast vit ætlaðu, at tað skuldi ganga skjótari við hesum, fegnast vit um, at vit nú hava fingið møguleikan at keypa okkum ein nýggjan sendara, sigur Preben Hansen.

Hann sigur, at Lindin hevur nógvar stuðlar, og at tað er gjøgnum hendan stuðul, at rásin hevur havt møguleikan at leggja pengar til síðis fyri at keypa ein sendara afturat.

– Vit hava eisini verið noydd at gera íløgur í útgerð fyri at fáa betri góðsku á sendingarnar, men nú hava vit tøkan pening til at keypa ein nýggjan sendara fyri, sigur Preben Hansen.




*Seinni í ár fer útvarpsrásin, Lindin, at senda umvegis Brúnaskarð. Nýggjru sendari verður bílagdur í næstum*

### Fleiri sendingar

Lindin sendir ymiskt andaligt tilfar - tónleik, bønarløtur, barnasendingar og aðrar sendingar.

– Vit gera fleiri og fleiri sendingar og tónleikaparturin er minkaður nakað seinastu tíðina. Vit hava eisini fingið nógvar stuðlar, so arbeiðið við Lindin hevur ment seg soleiðis, sum vit vónaðu, at tað fór at gera, sigur Preben Hansen.

– Vit hava givið fólki møguleikan at ringja inn til okkara, um tað hava tørv á onkrum, og tað eru alsamt fleiri fólk, sum brúka hendan møguleikan, sigur hann.

Lindin miðjar fram ímóti at hoyrast í Suðuroy, Sandoynni og Vágum eisini, men tær ætlaninar liggja longri frammi í tíðini. Fyrsta ítøkiliga æltanin er at fáa sendaran upp á Brúnaskarði.

# Børn og ba-bu

*Sløkkiliðið í Klaksvík helt 50 ára dagin hjá sær saman við børnuum leygardagin*

**Klaksvík:** Seinnapartin leygardagin ýldi óført í gøtunum í Klaksvík, har allir sløkkiliðsbilarnir í býnum vóru á ferð. Orsøkin var hvørki eldur ella nøkur vanlukka, men hinvegin ein hátíðardagur hjá sløkkiliðnum.

Klaksvíkar Sløkkilið gjørdist í gjár fimti ár, og hendan stóra dagin hildu sløkkiliðsmenninir leygardagin.

Børnini í býnum vórðu boðin á sløkkiliðsstøðina og upp í bilarnar, og nógv vóru tey, sum gjørdu sær dælt av hesum. Eini 500 børn vóru ein túr við onkrum av sløkkiliðsbilunum, og fitt av foreldrum høvdu eisini leitað sær fram við sløkkiliðsstøðini, har eitt kaffiborð var sett upp.

Seinni í hesi vikuni fer sløkkiliðið at hava eitt borðhald fyri sløkkiliðsmonnunum og ymsum stovnum og feløgum, sum sløkkiliðið samstarvar við.

### Trúfastir

Síðani Klaksvíkar Sløkkilið var stovnað fyri 50 árum síðani, hava 72 mans - og eingin kvinna – verið í sløkkiliðnum.

– Sløkkiliðsmenninir hava verið sera trúfastir, og tí hevur lítil útskifting verið í sløkkiliðnum, sigur Kári Kjelnes, leiðari.

– Tað eru vanliga hondverkarar í býnum, sum hava verið í sløkkiliðnum, men vit seta krøv til allar okkara mans, um at teir taka roykkavaraskeið, og summir hava tikið ymisk onnur skeið.

Umframt at verða boðsent til eldsbrunar í Norðoyggjum, verður sløkkiliðið í Klaksvík eisini boðsent til vanlukkur á sjógvi og landi. Í sløkkliðnum eru froskmenn, sum verða sendir út til vanlukkur á sjónum, og sløkkiliðið hevur eisini útgerð, sum kann brúkast í sambandi við ferðsluvanlukkur. Harafturat er sløkkiliðið eisini altíð á ferð, tá ódn ger um seg.

### Nýggjan bil

Klaksvíkar sløkkilið hevur tríggjar sløkkiliðsbilar, sum verða brúktir í sambandi við uppgávurnar hjá teimum, men ein gamal sløkkiliðsbilur er eisini framvegis at finna á sløkkiliðsstøðini, og leygardagin var hann tikin út at halda føðingardagin. Hesin bilurin er gamal, men er í góðum standi.

Ein nýggjur bilur er á veg til sløkkiliðið í Klaksvík, og hann skal millum annað brúkast í sambandi við vanlukkur á sjónum og stormskaðar.

Hesin bilurin skal avloysa ein annan av teimum gomlu bilunum hjá sløkkiliðnum.

# Martin býr enn á gøtuni

*Seinastu mánaðarnar havi eg sovið einar 20 nætur úti. Almannastovan hevur bjóðað mær eina ókeypis yvirlivilsisdrakt, men eg vil heldur hava eitt kamar, og eg eigi fyri húsaleiguna. sigur Martin Eliassen*

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Landnyrðingurin liggur so tráður yvir Havnina við regni, vindi og kulda mánamorgun og Martin Eliassen, 59 ára gamal, ættaður úr Klaksvík, er framvegis heimleysur í vælferðarsamfelagnum Føroyar ár 2000. Ein góður máni er farin síðan hann trein fram í Sosialinum og greiddi frá síni vána støðu, at hann ikki passaði inn í ta føroyska samfelagið. Hann er ikki nógv broyttur síðan tá, uttan at ein nýggj greflig skruða prýðir høgu pannuna.

-Eg var so óheppin eina náttina, eg svav úti, at eg datt av bonkinum, og pannan tók, sigur Artin og tekur um ennið.

-Hetta er av hundanum til, eg trúði ikki, at man kundi koma so illa fyri í Føroyum. Eg kenni meg sum ein útstoyttan, sum ongin vil hava nakað við at gera, sigur Martin Eliassen og er í døpurhuga.

-Eg leiti eftir einum kamari, allar helst í Klaksvík, men gongur hetta ikki, so í Havn ella onkra aðrastaðni. Eg havi pengar, eg kann rinda upp til 2000 krónur um mánaðin fyri eitt kamar.. Eg drekki næstan ikki fyri tíðina og ætli mær at vera friðaligur, gera lítið um meg. Er tað ongin, sum vil hýsa mær, sigur Martin Eliassen, bønandi.

### Gjørdist landskendur

Martin gjørdist landskendur,tá hann trein fram í Sosialinum herfyri. Men tað at gerast ein almennur persónur er bæði gott og ringt. Martin er í øllum førum enn heimleysur og hann hevur enn bara møtt levittum og prestum, ongum sameritanara.

-Fleiri hava sýnt mær samkenslu, men tað kemur ikki longur enn til føgur orð. Varandi hjálp havi eg ikki fingið. Onnur eru ógvuliga bevíst um mína støðu og vita akkurát hvussu eg skal gera. Tey fortelja mær inniliga, at eg sjálvur havi alla skuldina og biðja meg fara til arbeiðis aftur sum øll onnur í samfelagnum. Kanska hava tey rætt, men eg eri tíverri ikki førur fyri at arbeiða í løtuni, eg eri avlamin, sigur Martin Eliassen.

-Uppaftur onnur biðja meg gera sjálvmorð, men tað havi eg nú ikki ætlanir um í løtuni, sigur Martin Eliassen

- Í Sosialinum kom eisini fram, at eg plagdi at sova á Skansanum. Men tað ber ikki til longur. Nú kemur politiið á hvørji nátt við hundum og rekur meg og onnur heimleys burtur av Skansanum. Gera vit mótstøðu, so enda vit á støðini og fáa bót dagin eftir. Vit eru heldur ikki so fá heimleys í Havnini. Eg kenni eini 50 fólk, sum javnan búgva úti.




*Martin Eliassen er enn heimleysur og síðan hann trein fram alment hevur hann bara møtt prestum og levittum, ongum samaritanara*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

### Vónbrotin av heimbygdini

-Tað sum eg eri mest harmur um er viðferðin eg havi fingið av Klaksvíkar kommunu. Eg veit, at eg ikki eri nakað nemt menniskja, men at eg skal vera so ringur, at eg als ikki eru verdigur at búgva í Klaksvík, tað er ringt at svølgja. Eg haldi eisini tað tað er ein falitterklering av einum vælferðarstaði sum Klaksvík, at teir ikki klára at finna eina loysn fyri øllum borgarum í kommununi. Vit eru fimm klaksvíkingar sum rekast í Havnini, tí sosialu myndugleikarnir í Klaksvík ikki megna sína uppgávu. vit eru allir tvungni rat vera í Havn, hóast vit ikki vilja tað, sigur Martin Eliassen.



*Kirkjubøur og Velbastaður tikið lógvatak saman:*

# Bygt nýggjan skúla uttan almennan stuðul

*Tað var bæði hátíðar- og gerandisdámur á Velbastað leygardagin, tá nýggi skúlin og samkomið húsið varð tikið alment í nýtslu, og bygdaráðsformaðurin handaði nýggja skúlastjóranum lykilin til henda komandi undirvísingar og mentanarmiðdepilin í sóknini.*

Orð og myndir:
Jan Müller

Leygardagurin 16. september 2000 kemur helst at standa sum ein minniligur og týðandi dagur - varði - í søguni hjá fólkinum í Kirkjubøar-Velbastaðar sókn. Henda dagin varð nevniliga nýggi skúlin í sóknini tikin alment í nýtslu.

Tað er so avgjørt ikki nøkur gerandishending, at ein nýggjur skúli verður tikin í brúk her á landi. Í syndarligu kreppuárunum fyri meira enn 10 árum síðani varð gongdin júst hin øvugta. Tá fluttu so mangar familjur av landinum, at tað eisini fór at merkjast í skúlastovunum. Tað at ein nýggjur skúli nú verður tikin í brúk í eini sókn nærhendis Havnini eru væl eini týðandi tekin um, at tað grør um gangandi fót - at tað er við at gerast meira liviligt aftur í landinum.

Tað vóru eisini tær betraðu tíðirnar, sum vórðu orsøkin til, at fólkið í Kirkjubø og á Velbastað tóku stig til at fáa sóknarbørnunum ein nýggjan, rúmligan og tíðarhóskandi skúla.

### Barnatalið veksur

Á samkomu á skúlanum leygardagin segði bygdaráðsformaðurin, Annfinn Brekkstein, at kommunan gjørdi av at fara undir at byggja skúlan, tí at hon ásannaði, at barnatalið í kommununi er vaksið munandi og framvegis veksur. Seinast í 1997 varð gjørt av at fara undir at projektera og gera nýggja skúla.

– Vit standa so her í dag í einum nýggjum skúla og samkomuhúsi og eru vit sera stolt og errin av, at verkætlanin bleiv gjøgnumførd segði Annfinn Brekkstein, sum ásannaði, at hetta er fyrsti skúlin í Føroyum, sum er tikin í brúk í nýggju øldini.

Í røðu síni fyri umleið 200 bygdarfólkum, børnum, ungum, tilkomnum og eldri og umboðum fyri ymsar stovnar og myndugleikar vísti bygdarráðsformaðurin á, at Kirkjubøar kommuna (sum fevnir um bygdirnar Kirkjubø og Velbastað, blaðm.) hevur tikið nógv tung tøk í 90-unum, tí hon hevur verið við til at gjalda í Kreppulánsgrunnin fyri harvið at hjálpa teimum ringast støddu kommunum.

– Og vit eru glað fyri, at vit kundu hjálpa fyri at fáa gongd á aftur samfelagið – og vit eru so sanniliga eisini glað fyri at verða fyrsta kommunan, sum byggir skúla, eftir at skipanin varð broytt og landið als ikki longur rindar til skúlabygging.

Annfinn Brekkstein vísti á, at henda gongdin ber boð um, at fleiri og fleiri øki skulu leggjast út til kommunurnar at umsita og legði aftrat, at Kirkjubøar kommuna er ikki ímóti størri avgerðar- og ábyrgdarbýti. – Men skal tað gerast, so er samstundis neyðugt, at landið letur ein størri part av skattainntøkunum frá sær til kommunurnar, so tær megna at átaka sær tær uppgávur, sum landið áleggur teimum, fyri at sleppa undan, at tað, sum er bygt upp, syndrast.

Hann segði víðari, at tað eru alt ov nógv dømi um ógreið viðurskifti, tá talan er um , hvat er ein lands- og hvat er ein kommunuuppgáva, og hvat landið stuðlar og ikki.



*Nýggi skúlin fer at geva børnunum í sóknini sera góðar umstøður*

### Stuðul til Tórsvøll men ikki til skúla

-Hví er tað møguligt hjá landinum at lata 8 miljónir kr. í stuðuli til Tórsvøll, tá eingin stuðul verður latin til skúlabygging spurdi bygdaráðsformaðurin og helt fram: – Hetta sigi eg ikki fyri at øvunda Tórsvølli stuðulin. Men vit seta spurnartekin við lógarsmíðið, tá tað er møguligt at veita Tórsvølli stuðul, tá vit ikki kunnu fáa stuðul til skúlabygging. Vit meina, at tað ikki eigur at vera so, at ein fær stuðul til eitt mentunarøki, meðan ein annar einki fær til eitt annað mentunarøki. So hava vit fingið tað sagt segði ein rættiliga avgjørdur bygdarráðsformaður.

Skúlin, sum nú stendur liðugur, hevur kostað bygdarfólkinum góðar 6,4 mill. kr. Tvs. at eingin almennur stuðul er latin til skúlan. Lagalig fígging er fingin úr Føroya Banka.

Tað hevur leingi verið ov trongligt í gamla skúlanum í sóknini. Nú fáa næmingar og lærarar so góðar umstøður at virka undir. Umframt at brúka hølini til undirvísing er eisini ætlanin, at nýggi bygningurin skal hýsa samkomum og mentanarligum virksemi av ymsum slag. Ein kann siga, at hann er ein kombinatión av einum skúla, einum mentanarhúsi, einum samkomuhúsi og einum bygdahúsi. Sólarmagn, sum í langar tíðir, hevur verið karmurin um nógv av hesum virksemi, er vorðið ov lítið og ótíðarhóskandi. So umframt at fáa eina góðan skúla til at uppala og útbúgva komandi ættarlið í sóknini hevur alt bygdarfólkið, ið hevur stóran alsk til mentanarlig virði, fingið ein góðan karm at virka undir.

Á samkomuni leygardagin, sum varð bæði hátíðarlig og gerandislig við væl nøgdum og glaðum fólkum vórðu umboð fyri landsstýrið, undirvísar- og mentamálastýrið, fyri Føroya Lærarafelag oo. Umframt Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismann var eisini varalógmaður til steðar. Sosialurin, sum var á staðnum, fer í mikudagsblaðnum at hava eina reportasju frá hesi frálíku og stak livandi løtu á Velbastað.

# Lions lat tvær gávur





Lion Club í Klaksvík markeraði byrjanina til eitt nýtt Lions ár við at lata tvær peningagávur til feløg í Klaksvík.

Á eini samkomu, sum var á matstovuni, Shaghai, í síðstu viku, lat Hákun Dam vegna Lions Club í Klaksvík Klaksvíkar Hornorkestri og Klaksvíkar Kappróðrarfelag hvør sín kekk.

Lions Club í Klaksvík fer nú undir sítt virksemi aftur, og ymisk tiltøk verða í vetur. Millum annað hevur Lions Club fingið kendar persónar at mála málningar, sum skulu seljast á eini uppboðssølu seinni í ár.

*NÝTT í 3-aranum*

***FÁ SKIL Á TÍÐINI***

**STEMPUL UR**

**Vanlig stempulur**
Serliga ætlað smærri fyritøkum, ið vilja stýra arbeiðstíðum, arbeiðsuppgávum o.ø.

Sera lætt at brúka - tú stingur bara kortið niður í maskinuna, sum síðani stemplar, har hon skal. Lætt at forprogrammera eitt ár fram í tíðina.

***3-arin umboðar ur- og lása-skipanir hjá Dansk Tidskontrol. Vit hava nógvar loysnir uppá ymsar ur- og tíðarskipanir, sum hóska til fyritøkur, skúlar, ítróttarhallir og virkir í ymsum støddum. Kom inn til okkara og fá eitt prát við okkum um tín tørv.***

3arin

*SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

SANSIR · TEL 355 355